

# Danski Tjóðbankin hevur lækkað rentuna

Útlánsrentan hjá Danska Tjóðbankanum lækkaði við 0,1 prosentstigi til 1,45 prosent fríggjadagin. Somuleiðis lækkaði rentan á innskjótaraprógvum, (ið svarar til innlánsrentuna hjá Tjóðbankanum) við 0,1 prosentstigi til 1,35 prosent, eins og diskontorentan og foliorentan lækkaði við 0,1 prosentstigi til 1,10 prosent. Rentulækkingin kemur sum fylgja av, at Danski Tjóbankin hevur keypt útlendsk gjaldoyru.

# Tyrlan nógv úr gera í gjár

**Vegna óveður slapp Másin ikki út til Fugloyar í gjár. Tí fekk tyrlan meir enn nokk at gera. Hon var heilar fýra ferðir í Fugloy eftir fólki og einaferð í Svínoy.**

FERÐASAMBAND
*Dávur Winther*

Tað var eitt heilt annað ljóð og heilt ein onnur ferð yvir tyrluni í gjár. Hetta vísti seg eisini at vera tann nýggja AW 139 tyrlan, sum er bygd í Italia, ið reikaði runt um oyggjarnar.

Tyrlan flutti smá hálvthundrað fólk og bleiv tí nakað seinkað í mun til ferðaætlanina.

Við golmu tyrluni tekur túrurin úr Klaksvík til Kirkju um 15 min. Við nýggju tyrluni tók ferðir bert 9 min.

Og tey ferðandi vóru eisini nøgd. Friðarlig og lekkur, samstundis sum hon flýgur munin skjótari, tók eitt av ferðafólkunum til. Tú kanst sita og tosa inni uttan at rópa, vindeyguni eru størri og vakurt útsýni.

Hóast hinar tyrlurnar kunnu samanberast við ein nýsýnaðan Volvo frá 1975, har alt virkar, so er henda tyrlan bara ein »nýggjur Volvo« við tí komfort, tað býður, segði ein væl nøgdur ferðandi, sum gleddi seg at byrja gerandisdagin aftur eftir eina góða summarferiu í Fugloy.

Nýggj AW 139 tyrlan hevur flogið í sambandi við oljuvinnuna í Hollandi, Onglandi, Hetlandi og Danmark.

Atlantsflog vónar at fáa nýggjan sáttmála aðrastaðni innan oljuvinnuna í næstum.

Men í gjár gjørdi nýggja, snotisliga og kvika tyrlan sanniliga nyttuna millum Fugloy og Klaksvík eisini, har smá hálvthundrað summargestir, sum onkusvegna hava ættarbond úr Fugloy sluppu lættliga og ómakasleyst til hús aftur.

Bell trylurnar hava 2 x 900 hk, meðan nýggj AW 139 tyrlan hevur 2 x1800 hk, so tað má merkjast.



*Nýggja tyrlan flýgur millum Klaksvík og Kirkju upp á níggju minuttir – meðan sami túrur við tí gomlu tekur 15 minuttir*
*Mynd: Dávur Winther*

# Klaksvíkar Býráðið forkunnuga vitjan

VINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Frank Beckmann og Alexandra Bach, frá týsku stórfyritøkuni Nordsee, fingu hósmorgunin eina frágreiðing um Klaksvík – vinnu- og mentanarlívið har.

Frank er leiðandi innkeypari og Alexandra innkeypari hjá Nordsee, har um 150 fólkstarvast á høvuðsskrivstovui.

Fyritøkan, sum er meira enn 100 ára gomul, er størsta fiskivinnufyritøka í Týskalandi, eigur 360 fiskarestauratiónir í landinum umframt 100 matstovur í øðrum evropeiskum londum. Nú eru tey í ferð við at opna matstovu í Dubai. Nordsee hevur 5.000 fólk í arbeiði.

Tey hyggja seg um í Føroyum, vitandi at fiskagóðskan her er á høgum støði og ynskja møguliga at fáa samvinnu í lag við okkurt føroyskt fiskavirki.

Tey vóru hugtikin av, tí tey sóu og fingu at vita, og hildu at vit búgva í einum vøkrum landi við hópin av møguleikum.

Tað er Mercant v/Jógvan við Keldu, sum eisini hevur tætt samstarv við Danmarks Eksportråd, ið hevur fingið ferðina í lag.



*Frank Beckmann og Alexandra Bach, frá týsku stórfyritøkuni Nordsee saman við Dáva Winther mentanardeildarleiðara*